# HB hevur møguleika fyri hevnd

**EB/Streymur hevur trupulleikar í miðverjuni, tá ið teir fyri fjórðu ferð í ár skulu spæla ímóti meistarunum**

HB–EB/STREYMUR
*Jóannes Hansen*

Nú munnu teir skjótt fara at møðast av hvørjum øðrum. Tað eru fótbóltsspælararnir í HB og EB/Streymi, sum tað verður hugsað um. Hesi bæði liðini vóru saman í bólkaumfarinum. Tá vann HB 3–2 á heimavølli og 2–0 á Mølini á Eiði. Síðsta sunnudag hittust HB og EB/Streymur aftur. Tá endaði landskappingardysturin á Eiði málleysur.

Ta ferðina spældi EB/Streymur í ein tíma við tíggju monnum. Pacek varð rikin av vøllinum, tí hann hevði nýtt neyðbremsuna. Tí er hann leikbannaður leygardagin.

Trupulleikin í miðverjuni hjá EB/Streymi kann gerast uppaftur størri av, at Fróði Clementsen er ivasamur. Orsaka av skaða í beininm vandi hann ikki fyrrapartin av vikuni. Á Eiði vónaðu teir, at Fróði kortini fór at verða tøkur leygardagin.

EB/Streymur rakk fjórðingsfinaluni í steypakappingini í fjør.Higartil hava teir ongantíð verið í hálvfinaluni.

HB hevur vunnið steypakappingina fleiri ferðir enn øll hini feløgini til saman. Síðani tað í 1955 varð farið undir kappingina um Ísafjarðarbikarið, hevur HB ongantíð bíðað so leingi eftir steypasigri, sum teir hava gjørt hesa ferð. Í 1998 vann HB fyrsta Løgmanssteypið til ognar. Síðani tá hava teir tapt finalur ímóti GÍ í 2000 og NSÍ í 2002. Tað vil við øðrum orðum siga, at HB enn ongan lut eigur í Løgmanssteypinum, sum tað hevur verið spælt um síðani í 1999.

Hjá HB er sama fólkið tókt, sum var á Eiði sunnudagin. Ta ferðina hevði spælandi venjarin, Heine Fernandez, gjørt av, at hann ikki skuldi vera millum teir fyrstu ellivu.

Suni Johansen fer at døma millum HB og EB/Streym í Gundadali seinnapartin leygardagin.

# Fleiri eru framvið

**HB ætlar sær at vinna seg upp aftur í næstbestu deildina, og higartil hevur tað hjá teimum saman við NSÍ og Fram gingið sum eftir ánni**

3.DEILD
*Jóannes Hansen*

Í HB hava teir sett sær fyri, at tað í ár skal eydnast at endurvinna plássið í næstbestu deildini, sum teir mistu fyri tveimum árum síðani. Higartil hava teir fingið fult. Tað hava NSÍ, sum áður hevur havt lið í næstbestu deildini samstundis sum teir hava verið í 1. deild, eisini. Fram flutti upp í fjør. Higartil hava teir vunnið tveir teprar sigrar.

ÍF hevur lagt rygg til tvey stór tap, og hjá EB/Streymi hevur ikki gingið meiri enn passaligt. B68 flutti niður í fjør. Teir taptu í fyrsta umfari ímóti SÍ, sum er nýtt lið í deildini, og so megnaðu teir 2–2 ímóti GÍ, sum hevði verið frammanfyri við tveimum málum.

TB og Skála komu á talvuna, tá ið tey síðsta vikuskifti spældu javnt á Sevmýri. Skála javnaði í evstu løtu. Tí kendu teir seg meiri at hava vunnið eitt stig, meðan tvørámenn kendu seg hava mist tvey stig á stokkinum.

Í yvirlitinum eru allir upplýsingar frá dómaraseðlunum. Frá tveimum teimum fyrstu umførunum eru allir seðlarnir komnir á FSF skrivstovuna uttan tann frá fyrsta umfarinum, tá ið HB vann 2–0 á Skála. Upplýsingarnir um málskjúttar frá tí dystinum eru á HB heimasíðuni.

Um tað eru mistøk í yvirlitinum, so er tað tí, at dómaraseðlarnir ikki eru nóg neyvt skrivaðir. Ráðini til feløg og spælarar skulu tískil vera, at dómaraseðlarnir verða granskaðir beinanvegin, tá ið dómarin gevur felagnum avritið.

**3. deild**

1. umfar

Skála–HB 0–2 (0–1)
0–1: Gunnar Mohr
0–2: Heini Gaard

**NSÍ–TB 3–0 (1–0)**
1–0: Dan Knudsen 25.
2–0: Búgvi Olsen 68.
3–0: Debes Danielsen 90.

**SÍ–B68 4–3 (3–2)**
1–0: Jón Nielsen 4.
1–1: Símun Olsen 10.
2–1: Rúni Kruse 12.
3–1: Petur Niclasen 30.
3–2: Kristian Poulsen 34.
4–2: Jón Nielsen 70.
4–3: Kristian Poulsen 75.

**2. umfar**

**TB–Skála 1–1 (1–0)**
1–0: Birgir Jógvansson 31.
1–1: Rúni Haraldsen 90.

**ÍF–NSÍ 3–8 (1–4)**
0–1: Jan Nónklett 24.
0–2: Magni Jacobsen 30.
1–2: Poul Djurhuus 32.
1–3: Jan Nónklett 35.
1–4: Jan Nónklett 43.
1–5: Jan Nónklett 50.
1–6: Jan Nónklett 51.
1–7: Bjarki Danielsen 75.
2–7: Henry Petersen 80.
3–7: Henry Petersen 82.
3–8: John Dávur Djurhuus 87.

**Fram–SÍ 2–1 (2–0)**
1–0: Steingrímur Funding 13.
2–0: Áki Mortensen 16.
2–1: Ragnar Niclasen 84.

**B68–GÍ 2–2 (0–2)**
0–1: Heini Heinason 17.
0–2: Páll Rói Poulsen 19.
1–2: Arnfinn Olsen 57.
2–2: Arnfinn Olsen 66.

**EB/Streymur–HB 1–5 (0–0)**
0–1: Rasmus Nolsøe 47.
0–2: Rasmus Nolsøe 49.
1–2: Brian Olsen 53.
1–3: Heini Gaard 70.
1–4: Heini Gaard 76.
1–5: Johan E. Mouritsen 79.

**Støðan**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| NSÍ | 2 | 2 | 0 | 0 | 11–3 | 6 |
| HB | 2 | 2 | 0 | 0 | 7–1 | 6 |
| Fram | 2 | 2 | 0 | 0 | 4–2 | 6 |
| GÍ | 2 | 1 | 1 | 0 | 9–4 | 4 |
| SÍ | 2 | 1 | 0 | 1 | 5–5 | 3 |
| B68 | 2 | 0 | 1 | 1 | 5–6 | 1 |
| Skála | 2 | 0 | 1 | 1 | 1–3 | 1 |
| TB | 2 | 0 | 1 | 1 | 1–4 | 1 |
| EB/S | 2 | 0 | 0 | 2 | 2–7 | 0 |
| ÍF | 2 | 0 | 0 | 2 | 5–15 | 0 |

**Málskjúttar**

| | | |
|---|---|---|
| Magni Jacobsen | GÍ | 5 |
| Jan Nónklett | NSÍ | 5 |
| Heini Gaard | HB | 3 |
| Arnfinn Olsen | B68 | 2 |
| Kristian Poulsen | B68 | 2 |
| Steingrímur Funding | Fram | 2 |
| Heini Heinason | GÍ | 2 |
| Rasmus Nolsøe | HB | 2 |
| Henry Petersen | ÍF | 2 |
| Jón Nielsen | SÍ | 2 |
| Símun Olsen | B68 | 1 |
| Brian Olsen | EB/S | 1 |
| Sigfríður Abrahamsen | EB/S | 1 |
| Rógvi Højgaard | Fram | 1 |
| Áki Mortensen | Fram | 1 |
| Kaj Ennigarð | GÍ | 1 |
| Páll Rói Poulsen | GÍ | 1 |
| Gunnar Mohr | HB | 1 |
| Johan E. Mouritsen | HB | 1 |
| Poul Djurhuus | ÍF | 1 |
| Rúni Petersen | ÍF | 1 |
| John Thomsen | ÍF | 1 |
| Bjarki Danielsen | NSÍ | 1 |
| Debes Danielsen | NSÍ | 1 |
| Jóhan Dávur Djurhuus | NSÍ | 1 |
| Magni Jacobsen | NSÍ | 1 |
| Dan Knudsen | NSÍ | 1 |
| Búgvi Olsen | NSÍ | 1 |
| Rúni Haraldsen | Skála | 1 |
| Rúni Kruse | SÍ | 1 |
| Petur Niclasen | SÍ | 1 |
| Ragnar Niclasen | SÍ | 1 |
| Birgir Jógvansson | TB | 1 |

# Spennandi steypadystur í Gundadali

**B36 ætlar at kappast við KÍ, og Dýra biðjudag fer í fyrru hálvfinaluni at bera til at staðfesta, hvat av hesum liðunum er betri fyri**

KVINNUFÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Fyri fyrstu ferð verður støðutalvan uppgjørd í dag. Hon er eitt sindur misvísandi. Summi feløg hava spælt tveir dystir, og onnur hava bara spælt eina ferð. Eingin ivi er um, at tað verða B36 og KÍ, sum fara at stríðast um FM og sigur í steypakappingini.

Dýra biðjudag tørna hesi bæði liðini saman í fyrru hálvfinaluni í steypakappingini. Dysturin verður spældur í Gundadali. Hetta verður fyrsta innanhýsis styrkisroyndin millum favorittarnar, síðani B36 gjørdi seg út av nýggjum. Rannvá Augustinussen og Halltóra Joensen, sum í fjør spældu við HB, eru fluttar í B36. Árstalsfelagið vil vera við í kappingini um FM, sum tær ikki hava vunnið síðani í 1998, og um sigur í steypakappingini, sum tær ikki hava vunnið síðani í 1997, tá ið tær vunnu Dagblaðssteypið til ognar.

Í hinari hálvfinaluni fara AB og EB/Streymur at spæla. Laurits í Króki skal døma í Gundadali, og Finnur Andreasen skal døma í Gundadali Dýra biðjudag, har B36 og KÍ kvinnurnar hittast klokkan trý.

**1. deild kvinnur**

2. umfar

**B36–EB/Streymur 9–0 (7–0)**
1–0: Rannvá Augustinussen 3.
2–0: Ása Dam á Neystabø 6.
3–0: Ása Dam á Neystabø 12.
4–0: Halltóra Joensen 18.
5–0: Anja Weihe 20.
6–0: Ása Dam á Neystabø 23.
7–0: Ása Dam á Neystabø 45.
8–0: Arnbjørg Danielsen 79.
9–0: Ása Christiansen 86.

**GÍ/B68–FS Vágar 5–0 (3–0)**
1–0: Lis Justinussen 20.
2–0: Anja Klæmintsdóttir 23.
3–0: Mary–Ann Isaksen 33.
4–0: sjálvmál 52.
5–0: Marjun Joensen 81.

**Sumba–AB 0–10 (0–5)**
0–1: Hellen Haraldsen 3.
0–2: Rudi Rasmussen 22.
0–3: Elin Katrina Haraldsen 33.
0–4: Maria Mikkelsen 38.
0–5: Elin Katrina Haraldsen 42.
0–6: Elin Katrina Haraldsen 55.
0–7: Maria Mikkelsen 61.
0–8: Elin Katrina Haraldsen 69.
0–9: Anja Johansen 80.
0–10: Maria Mikkelsen 90.

**Støðan**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| B36 | 2 | 2 | 0 | 0 | 17– 2 | 6 |
| AB | 1 | 1 | 0 | 0 | 10– 0 | 3 |
| KÍ | 1 | 1 | 0 | 0 | 9– 0 | 3 |
| FSV | 2 | 1 | 0 | 1 | 6– 5 | 3 |
| GÍ/B68 | 2 | 1 | 0 | 1 | 7– 8 | 3 |
| EB/S | 2 | 0 | 0 | 2 | 0–18 | 0 |
| Sumba | 2 | 0 | 0 | 2 | 0–16 | 0 |

**Málskjúttar**

| | | |
|---|---|---|
| Elin Katrina Haraldsen | AB | 4 |
| Ása Dam á Neystabø | B36 | 4 |
| Anja Weihe | B36 | 4 |
| Maria Mikkelsen | AB | 3 |
| Ása Christiansen | B36 | 3 |
| Halltóra Joensen | B36 | 3 |
| Rannvá B. Andreasen | KÍ | 3 |
| Malena Josephsen | KÍ | 3 |
| Annika Niclasen | FSV | 2 |
| Jóna Petra Thomsen | FSV | 2 |
| Hellen Haraldsen | AB | 1 |
| Anja Johansen | AB | 1 |
| Rudi Rasmussen | AB | 1 |
| Rannvá Augustinussen | B36 | 1 |
| Arnbjørg Danielsen | B36 | 1 |
| Elsebeth Jónsson | B36 | 1 |
| Eivy Johannesen | FSV | 1 |
| Maria Reynstind | FSV | 1 |
| Heidi Heinesen | GÍ/B68 | 1 |
| Mary–Ann Isaksen | GÍ/B68 | 1 |
| Marjun Joensen | GÍ/B68 | 1 |
| Lis Justinussen | GÍ/B68 | 1 |
| Anja Klæmintsdóttir | GÍ/B68 | 1 |
| Mai Britt Svalbard | GÍ/B68 | 1 |
| Ragna B. Andreasen | KÍ | 1 |
| Vivian Bjartalíð | KÍ | 1 |
| Maria við Neyst | KÍ | 1 |
| sjálvmál | GÍ/B68 | 1 |



